tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Møtt:** Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Boga Johannesen.

**Ikki møtt**: Alvi Mortensen (Fráboðað)

**Skrivari:** Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skatti 2019/2020-09 Jan.-Sep. | 2 |
| 2 | 2. viðgerð. Tværoyrar Havn - Súpanarvíkin - vetrarlega fyri Thorshavn | 2 |
| 3 | 2. Viðgerð. TB-Flogbóltur umsókn um stuðul | 3 |
| 4 | 2. Viðgerð. Brandbilur -keyp av stigabili | 5 |
| 5 | 2. viðgerð Teldur til Tværoyrar Skúla | 7 |
| 6 | FSR- Rakstrarstuðul til neyst á Hvítanesi | 10 |
| 7 | BHS -Fíggjarætlan 2021 fyri Bú- og Heimatænastuna | 11 |
| 8 | Skipa frálæru í føroyskum | 12 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.34.00-1-20**

## 1. Samanbering av skatti 2019/2020-09 Jan.-Sep.

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 2. september 2020.**
Samanbering av skattainntøkum 2019/2020-09 (Jan-Sept.)

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 1:**
Nevndin er kunnað um skattatølini fyri september 2020.

### Avgerð

Málið var umrøtt og kunna

**08.02.06-G01-1-20**

## 2. 2. viðgerð. Tvøroyrar Havn - Súpanarvíkin - vetrarlega fyri Thorshavn

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 12. mars 2020**
Frits Strøm vitjaði á býráðsskrivstovuni 11. mars, og handaði eitt skriv til kommunustjóran -vegns m/s Thorshavn-, við áheitan á Tvøroyrar kommunu um at betra um umstøðurnar og trygdina hjá m/s Thorshavn at liggja við bryggja.

**Tekniskur leiðari 10-09-2020**
Vísandi til punkt um at Hvítanesbrúgvin er í ringum standi, kann súpanarvík djúpast og so sleppur Thorshavn at liggja har fyri veturin

**. 15. september 2020, pkt. 3:**
Tekniskur leiðari 10-09-2020

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Tað er stóru vági at lata Thorshavn liggja við brúnna á vetrartíð, bæði fyri brúnna og skipið. Mælt verður til at dýpa súpanarvík, og eftir samskifti við kaifúta JBG, er talan um minni økið á botni, fyri at sleppa inn at leggja til kai. Arbeiði kann gerast av lokalum veitara sum eitt roknings arbeiði á minni enn 50.000,- við mettum vága á 50%. Peningur til hetta kemur fá konto 719 (løgujáttan Tvøroyar havn).

**Vinnu- og havnanevnd, 15. september 2020, pkt. 3:**
Nevndin tekur undir við, at arbeiðið verður sett í gongd.

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avsett á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.
FÆ2020 §719 -íløga Tvøroyrar Havn -avsett kr. 2.030.000,-, (Zinkanodir)
FÆ2020 §721 -íløga bátahavnin -avsett kr. 1.500.000,- (Bátabrúgvar á Tvørabakka)

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 5:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælið hjá vinnu og havnanevndini. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið, 30. september 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 23.10.2020**
2. viðgerð av eykajáttan til at dýpa súpanarvík.

### Avgerð

Einmælt samtykt at veita eykajáttan til at dýpa Súpanarvík.

**18.20.00-2-20**

## 3. 2. Viðgerð. TB-Flogbóltur umsókn um stuðul

### Málsfrágreiðing

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 09.08.2020**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá TB-Flogbólti um stuðul á kr. 150.000,- um ári. Felagið upplýsir m.a. í umsóknini at:

*"TB-flogbóltur hevur umleið 200 limir, íroknað hvílandi limir og leikarar frá 6 ára aldri til meistaradeildina.*
*TB-flogbóltur hevur altíð lagt stóra orku í ungdómsarbeiðið. Hetta sæst aftur í okkara avrikum, har TB KIDS – tey smáu børnini frá útibarnagarði til 4. flokk - hava klárað seg væl – tey eru fremst í øllum árgangum.*
*Sum liður í menningini av leikarunum í TB-flogbólti, hevur TB-flogbóltur havt ein sáttmála í 2 ár við Mirko Ristovic. Vit meta, at Mirko hevur ment okkara felag og okkara leikarar, og vilja tryggja okkum, at okkara evnaríku leikarar halda fram at íðka flogbólt, har bæði leikarar og felag eru í støðugari menning. Vit eru væl nøgd við arbeiðið, ið Mirko hevur gjørt í felagnum, og eru vit í samráðingum um at longja sáttmálan"*

**Mentanarnevndin, 17. august 2020, pkt. 6:**
Málið verður útsett til næsta fund í MN.

**Kommunustjórin 27.08.2020**
Ongir pengar eru avsettir til TB-flogbólt á FÆ2020. Tó er avsett á FÆ2020 §524 (Stuðul til ítrótt kr. 780.000.-) -pr. d.d. er eftir á §524 kr. 258.000-. Stuðulin til TB flogbóltur 2019, var kr. 110.000,-.

**Mentanarnevndin, 21. september 2020, pkt. 2:**
Samtykt er at tað ikki ber til at stuðla yvir fleiri ár, og at veita ein stuðul á kr. 130.000,- fyri ár 2020, sum er ein hækking samanborið við ár 2019, har stuðulin var kr. 110.000,-

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avset á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.
FÆ2020 §524 Stuðul til ítrótt avsett kr. 780.000.-,

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 8:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið, 30. september 2020, pkt. 6:**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 23.10.2020**
2. viðgerð av eykajáttan av stuðul til TB-Flogbólt.

**Avgerð**

Einmælt samtykt við 2. viðgerð, at veita TB flogbólti stuðul á kr. 130.000,-

**14.05.02-1-20**

## 4. 2. Viðgerð. Brandbilur -keyp av stigabili

**Málsfrágreiðing**

**Kommunustjórin 10.09.2020**
Átaksleiðarin hevur heitt á umsitingina um at viðgerða keyp av brúktum stigabili, sum Tórshavnar Sløkkilið letur selja, orsakað av teir hava keypt nýggjan. Anfinn Leo, átaksleiðari hevur í hesum sambandi vent seg til átaksleiðaran í Vági, Gudmund Jacobsen, og eru teir samdur um at her er talan um ein brandbil/stigabil, sum nøktar tørvin fyri alla Suðuroynna, og at bilurin er í góðum standi hóast at hann er 20 ára gamal.

Átaksleiðararnir mæla til, at hesin bilurin verður keyptur, og at hann verður partur av allari tilbúgvingini fyri alla Suðuroynna.

Keypsprísurin er kr. 350.000,-, og við tað at bilurin nærkast 20 árum, krevst eftirlit á henda, sum vantandi kemur at kosta kr. 300.000,- í komandi ár.

Kommunustjórin mælir til at fylgja tilmælið hjá Átaksleiðarunum, og avseta neyðuga játtan til keyp av hesum stigabilinum, sum teir metta nøkta tørvin, og sum beinanvegin kann verður virkin partur av tilbúgvingini í Suðuroynni, fyri eina lítla íløgu, samanborði við kostnaðin av tilsvarandi nýggjum bili. -Hetta er eisini er í trá við váðametingina í ávegis tilbúgvingarætlanina fyri Tvøroyrar kommunu, har víst verður á, at m.a. er stórur tørvur er á einum stigabili.

Støða skal takast til:

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

1. Um bilurin skal keypast?
2. Um bilurin verður keyptur í felag við allar kommunur í Suðuroynni. Hetta merkir, at keypið er tenkt av, at allar kommunur taka undir við hesum, og at hvør einstøk kommuna avsetur íløgu kostnaðin eftir einum býtislykli t.d. íbúgvum í hvørjari kommunu sær.
3. At Tvøroyrar kommuna keypir bilin, og ber alla íløgukostnaðin, fyri eftirfylgjandi at millumrokna við hinar kommunurnar, eftir sama leisti sum verður gjørt við Líkbilin.

Kommunustjórin vil gera vart við, at tað er sera umráðandi, at slík amboð vera knýtt at ávísum persónum, við røttum førleika, og sum fáa álagt ábyrgd av at útbúnaðurin verður royndur, soleiðis at hesin er virkin tá veruligi tørvur er. -Tí verður mælt til -um bilurin verður keyptur í felag- at tað frammanundan er gjørd avtala um hvør hevur ábyrgd av at røkja henda, og at ongin ivi er um, hvar bilurin kemur at standa.

Verður avgjørt at keypa bilin krevst eykajáttan. Fígging kann flytast av íløgum FÆ2020, sum enn ikki eru framdar.

**Tekniska nevnd, 15. september 2020, pkt. 5:**
**Kommunustjórin 21.09.2020** -fundurin, ið upprunaliga skuldi vera í Tekniskunevnd 15. sep., bleiv útsettur til 21. sep., men hesin var kortini ikki 21. sep. Kommunustjórin metur ikki, at hetta mál kann bíða enn 1. mnd, inntil fundur aftur er í Tekniskunevnd. Mælt verður tí til, at fíggjarnevndin tekur eina avgerð, sum hinar kommunurnar í Suðuroynni og seljarin av stigabilinum kann fyrihalda seg til.

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avsett á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 12:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum, at Tvøroyrar kommunan keypir bilin, og eftirfylgjandi fær í lag gjaldsavtalu og samstarvsavtalu við granna kommunurnar í oynni. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið, 30. september 2020, pkt. 9:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna keypir stigabilin, og at umsitingin eftirfylgjandi samráðist við hinar kommunurnar í Suðuroynni, um at fáa í lag eina felags fígging av bilinum, soleiðis at stigabilurin verður partur av allari tilbúgvingini í Suðuroynni.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 23.10.2020**
Hesar kommunur hava pr. 27.10.2020, samtykt at vera við í keypinum av stigabili, Hvalba, Fámjin, Porkeri, Sumba, Vág og Tvøroyri. Enn manglar svar frá Hov.

**Kommunustjórin 23.10.2020**
2. viðgerð av eykajáttan til keyp av stigabili.

**Avgerð**

Einmælt samtykt við 2. viðgerð, at keypa stigabil

**17.35.00-Ø40-1-20**

## 5. 2. viðgerð Teldur til Tvøroyrar Skúla

**Málsfrágreiðing**

**Umsókn frá skúlastjóranum dagft. 07.05.2020, um játtan til keyp av teldum til Tvøroyrar Skúla.**

Til Tvøroyrar Kommunu

Nú er tíðin komin at taka næsta stig á telduøkinum.

Útbúnaðurin vit hava í dag er settur saman soleiðis, - um vit fara aftur til 2009 so fingu vit teldur til teldustovuna, 18 fastar teldur. Í 2012 eitt sett av teldum, sum bert blivu brúktar til próvtøkurna og activ inspire talvur og nec uppvørpur til hesar í allar skúlastovurnar . Í 2014 fingu vit 24 teldur við 2 telduvognum, sum standa fast í Trongisvági. Í 2015 keyptu vit 4 stationærar teldur til skúlahúsið. Hartil hava vit í 2016 keypt 6 teldur, sum primært vera nýttar av førleikastovuni. Samanumtikið kann ein siga, at KT-útbúnaðurin hjá Tvøroyrar skúla er rættuliga gamal, og tí, í summum førum so at siga óbrúkiligur.

**Tað eru fleiri orsøkir til, at vit søkja um játtan.**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Gongdin hevur lagað tað so, at tær teldurnar, sum blivu brúktar til próvtøkur, nú standa úti í skúlastovunum, til næmingar, sum nýta cd-orð, og í skúlahúsinum. Nakrar fáar teldur eru eftir at nýta til verkætlanir og annað. T.v.s. vit hava ongar teldur til "vanliga undirvísing".
- Tá vit hava próvtøkur, hava vit tað soleiðis, at næmingarnir í mest møguligan mun taka sína egna teldu við. Hendan støðan er ikki nøktandi, tí fleiri og fleiri næmingar helst vilja hava teldu frá skúlanum, tí hendan lýkur alt tey skulu brúka til próvtøkuna. Henda gongdin ger at vit ikki hava teldur at lata øllum næmingunum sum ynskja tað.
- Til landsroyndirnar er 4. flokkur í Trongisvági og brúkar teldurnar í telduvogninum. 6 flokkur sum er 26 næmingar situr partvíst í teldustovuni og ein partur í fundarhølinum.
- Tíðin er farin frá teldustovum. Vit ætla tí at avtaka teldustovuna, sum so verður brúkt sum vanlig skúlastova.
- Teldur og teldlar verða nýttir meira og meira í tí dagligu undirvísingini. Tá er tað sera hent at lærarar og næmingar hava atgongd til teldur.
- Um vit hyggja eftir árstølunum so síggja vit, at vit nú flyta okkum frá at hava hoskandi teldur og amboð, til at vera eftirbátur á hesum øki.
- Nú koronasmittan kom á okkum, og allir næmingar skúlans vóru sendir heim, stóðu vit brádliga við einum alstórum trupulleika. Heilt nógvir næmingar manglaðu teldur og kundu tí ikki taka ímóti fjarundirvísing. Allar tøkar teldur í skúlanum blivu lántar út, og eru í løtuni heima hjá næmingum.

Vit hava tosað við aðrar skúlar, og er tað ymiskt, hvussu teir loysa KT-spurningin. Summir geva næmingunum ein teldil í part, meðan aðrir hava farteldur á skúlanum í minsta lagi 80 (Fuglafjarðar skúli).

Ætlan skúlans er at keypa 60 nýggjar farteldur, tí so meta vit, at vit nøkta tørvin her og nú.

Skúlin hevur ikki havt eina langtíðarætlan á KT-økinum, hetta halda vit er umráðandi, so íløgurnar kunnu strekkjast yvir fleiri ár.

Vit hava fingið tilboð frá Nema, Formula og Aktiv. (sí viðheftu skjøl).

**Kommunustjórin 07.05.2020**
Tvøroyrar Skúli hevur arbeitt við einari ætlan um at útskifta gomlu teldurnar, og ístaðin keypa nýggjar tíðarhóskandi teldur til næmingarnar. Hetta er blivið meira átrokandi og aktuelt, nú Korona kreppan hevur viðført, at neyðugt hevur verði við fjarundirvísing.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Ætlan skúlans er at keypa 60 nýggjar farteldur, fyri at nøkta tørvin her og nú. Tvøroyrar Skúli hevur vent seg til aðrar skúlar fyri at hoyra um teirra royndir, og skúlin hevur móttikið tilboð frá 3 veitarum.

Teldur eru eitt týðandi arbeiðsamboð í nútíðarsamfelagnum og er eisini vorðin eitt týðandi amboð í fólkaskúlanum. Fyri at tryggja, at allir næmingar hava tíðarhóskandi skúla amboð, sum eru javnt góð, verður mælt til, at skúlin á hvørjum ári keypir teldur, svarandi til talið av einum nýggjum árgangi av næmingum, soleiðis at málið er, at allir næmingar frá 4. til 10. flokk hava egna teldu.

Mælt verður til, at næmingarnir gjalda eitt depositum fyri teldurnar, sum næmingarnir fáa aftur, tá teldan verður latin inn aftur.

Krav til teldukeyp á hesum sinnið er:

HP Elitebook 840G3
14" Full HD skærm 1920x1080
Intel Core i5-6200 SkyLake
8GB RAM
256GB SSD
USB-C, USB 3.0, DisplayPort, Dock connection
Vægt kun 1,54 kilo og 17,8mm tynd
Windows 10 Pro
2 års garanti.

Neyðugt er við eykajáttan, tá peningur ikki er avsettur til hetta á fíggjarætlanini fyri árið 2020.

**Mentanarnevndin, 11. maj 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Aktiv uppá 40. stk. teldur fyri kr. 149.920,- ex.mvg. Málið verður beint í Fíggjarnevndina. Umsitingin heitur á leiðsluna í Tvøroyrar Skúla um at innlata uppskot til teldur/útbúnað til FÆ2021, og gera eina langtíðarætlan á KT økinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 10:**
Einmælt samtykt, at fylgja tilmælið frá Mentanarnevndini og taka av tilboðnum frá Aktiv uppá 40. stk. teldur fyri kr. 149.920,- ex.mvg. Fíggingin verður veitt við eykajáttan.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 27. maj 2020, pkt. 4:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini, at játtanin verður veitt við eykajáttan.

**Kommunustjórin 02.10.2020**
2. viðgerð av eykajáttan til keyp av teldum til Tvøroyrar Skúla

**Avgerð**

Einmælt samtykt við 2. viðgerð, at játta keyp av teldum til Tvøroyrar skúla.

**02.34.02-G01-14-13**

## 6. FSR- Rakstrarstuðul til neyst á Hvítanesi

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 19.10.2020**
Uni Jacobsen, hevur vegna nevndina í FSR sent umsitingini teldupost við umsókn um váttan frá Tvøroyrar kommuna um rakstrarstuðul, ísamb. við at FSR hevur vent seg til LOA -Lokale og Anlægsfonden- um luttøku í verkætlanini at byggja nýtt kappóðrarneyðst.

FSR skrivar í umsókníni at: "Við at fara í samstarv við Lokale og anlægsfonden, seta teir krøv og vilja hava eina ávísa trygd fyri, at verkætlanin kann byggjast og serliga rekast eftirfylgjandi, soleiðis at grundarlagi við stuðlinum kann varðveitast"

1. Rakstraræltanin inniheldur útreiðslur til ljós, hita og trygging. Í ætlanini er daglig vasking av skiftirúmum og umsjón. Bygningurin er nýggjur og tí er eingin peningur settur av fyrstu fimm árini til beinleiðis viðlíkahald. Mett verður at árligi raksturin fyri bygningin fer at liggja ímillum 183.000,- og 254.000,- har viðlíkahald er við í seinnru upphæddini.
2. Ynskiligt er, at hendan váttanin kann nýtast beinleiðis til LOA grunnin frá Tvøroyrar kommunu soleiðis, at LOA grunnurin stutt og greitt veit at raksturin verður tryggjaður framyvir, tó uttan at nøkur serlig krøv frá LOA grunninum eru um hvussu hettar verður gjørt.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 8:**
Nevndin tekur undir við at senda skriv til LOA-grunnin við tilsøgn um rakstrarstuðul til FSR-neyst.
Málið verður beint í býráðið.

**Avgerð**

Einmælt samtykt, at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini at veita FSR rakstrarstuðul til nýtt neyst.

**00.30.00-2-20**

## 7. BHS -Fíggjarætlan 2021 fyri Bú- og Heimatænastuna

**Málsfrágreiðing**

**Kommunustjórin 2. oktober 2020**
Fíggjarætlan 2021 fyri Bú-og Heimatænastuna til viðgerðar

**Sosiala nevnd, 12. oktober 2020, pkt. 1:**
Amy Bech, fíggjarleiðari luttók í málsviðgerðini. Fíggjarætlanin fyri BHS var kunna og viðgjørd, við tí viðmerking, at inntøkumetingin í fíggjarætlanini ikki er røtt samb. kunning frá Amy Bech. Nýggj inntøkumeting (afturberingin) galdandi fyri Tvøroyrar kommunu, er kr. 21.513.000,- og ikki kr. 22.339.000,- Einmælt samtykt, at heita á stýrið fyri BHS at viðgera fíggjarætlanina av nýggjum, og at fíggjarleiðari hjá Tvøroyrar kommuna framyvir skal luttaka á stýris fundinum hjá BHS, tá fíggarviðurskiftir eru á skrá, sum samtykt av Tvøroyrar býráð.

**Kommunustjórin 16.10.2020**
Kommunustjórin hevur sent skriv til leiðsluna og stýrisform. fyri BHS, um at viðgerða fíggjarætlanina fyri BHS av nýggjum, nú afturberingin til kommunurnar er munandi minni enn ásett í fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 3:**
Nevndin er kunnað um at fundur verður í Bú- Heimatænastuni, og at nýggj fíggjarætlan verður gjørd.
Málið verður tikið uppaftur.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fíggjarleiðar luttekur á fundi í BHS -Málið var umrøtt og kunna, har kommunustjórin hevur sent BHS áheitan um at viðgera fíggjarætlanina av nýggjum nú afturberingin frá landinum er minni enn ásett.

**18.15.01-G01-1-19**

## 8. Skipa frálæru í føroyskum

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 08.10.2020**
Á fundi í Miðnámsskúlanum í Hovi 23. Sep. 2020, har umboð fyri allar kommunur í Suðuroynni viðgjørdi skipan av undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar í Suðuroynni, var breið semja um at, at best var um undirvísingin fer fram í Miðnámsskúlin. Hetta vil geva teimum sum undirvísa betri møguleika fyri vitanardeiling, og allir tilflytarar fáa møguleikan at møtast á einum staðið. Tilmælið er, at taka undir við uppskotinum, har hvør kommuna sær ber flutningskostnaðin hjá tilflytarum millum heimið og Miðnámsskúlan.
-Avtala er at kvøldskúlaleiðarin møtur á fundinum-

**Mentanarnevndin, 12. oktober 2020, pkt. 8:**
Lív Næs var á fundinum og kunnaði um ætlanina "Skipa frálæru í føroyskum".

**At taka støðu til.**

- Skipa fyri undirvísing til tilflytara (annan uppruna enn Skandinavar), og at hetta verður at fara fram í Miðnámsskúlanum í Hovi.
- Skipa fyri undirvísing fyri Skandinavar.- Lív mælir til at Maria Jensen verður at undirvísa, samb. tilfari hon sjálv hevur framleitt. -Mælt verður at brúkaragjaldi verður kr. 850,- fyri 6. mnd.

Einmælt samtykt, at Lív Næs far heimild til at samskipa undirvísingina fyri tilflytara, og mentanarnevndin tekur undir við frálæruætlanina. -Og umsitingin samskipar ætlanina við hinar kommunurnar í Suðuroynni.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 7:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini sum eina roynd í árinum 2020/2021.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 28. oktober 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin 19:40**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan